

BJARTSKYGNI

*- Hóast fólkatalið minkar og vit onga dagrøkt hava nú, mugu vit altíð síggja bjart uppá framtíðina, sigur Elsa Andreasen úr Haldórsvík, og sum eisini er bygdaráðslimur í Sunda kommunu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Har var einki annað at gera

**DAGRØKT Hósdagin í farnu viku var seinastu dagurin, at dagrøkt var í Haldórsvík. Orsøkin er hin einfalda, at bert eittans barnið var eftir í dagrøktini. - Hetta er sjálvandi ein óheppin støða, sigur Elsa Andreasen úr Haldórsvík og sum eisini er bygdaráðslimur í Sunda kommunu**

Snorri Brend

**Haldórsvík:** Hagtølini króg-va ikki veruleikan í hugnaligu bygdini í Norðurstreymoy.

Seinastu árini hevur fólkatalið bara gingið tann skeiva vegin. Í 1985 vóru tey 207 í tali, men nú er tað uppá tað lægsta í longri tíð.

Við árslok í fjør var talið komið heilt niður á 134, og so lágt hevur tað ikki verið áður.

Ein natúrlig fylgja av hesi afturgongdini er barnatalið sum eisini er minkað. Í skúlanum eru í dag 19 næmingar.

Og nú var støðan vorðin soleiðis, at frá 1. apríl at rokna er heldur eingin skipað dagrøkt í bygdini.

- Hetta er sjálvandi harmiligt, men ringt er at gera nakað við hetta, sigur Elsa Andreasen.

## 8-3

Henda støðan við tí einabarninum í dagrøktini í Haldórsvík, fekk bygdaráðið í Sunda kommunu at taka hetta málið upp til viðgerðar á fundi mánakvøldið í farnu viku.

Tilmælið sum bygdaráðið skuldi umrøða var, at kommunan, av hesi orsøk sá seg noydda at niðurleggja dagrøktina í bygdini frá hesum degi. Og hetta málið varð eisini samtykt.

Fyri at niðurleggja dagrøktina atkvøddu 8 av limunum í Sunda kommunu.

Hesir vóru Kim Durhuus, Trygvi K. Joensen, Finnbogi Midjord, Magnus Pauli Dahl-Olsen, Thordis Dahl-Hansen, Hans David Dam, Sofus D. Johannesen og Gurið Samuelsen.

Ímóti avgerðini vóru tríggjar atkvøður - Sigrid Christensen, Asbjørn Djurhuus og Elsa Andreasen.

Í morgun fingu vit orð á Elsu, og sigur hon millum annað soleiðis:

- Tað er hvørki gott fyri barnið ella dagrøktina, bert við einum barni, vísir Elsa Andreasen á.

## Harmiligt

Tað kom kanska óvart á onkran, at eingin dagrøkt hereftir er í Haldórsvík.

Sjálv heldur Elsa, at talan er um eina natúrliga frágongd, sum hon tekur til, og millum annað eisini tann veruleikin, at onkur foreldur lata børn síni ganga í dagstovnum aðrastaðni í kommununi.

- Tað hendi kanska fyrri enn væntað, at vit máttu taka hetta málið upp, vísir hon á.

Elsa slær tó fast, at tað altíð er harmiligt tá slíkt hendir, men hon væntar tó ikki, at bert hetta fer at avoyða heimbygd hennara.

- Tað má tíðin vísa, hvussu fólkatalið verður framyvir í bygdini, sigur hon at enda.

*snorri@sosialurin.fo*

## Framtíðin

Hóast fólkatalið í Haldórsvík minkar og at bert eittans barnið var eftir í dagrøktini, hevur Elsa Andreasen ikki mist mótið um eina framtíð í heimbygd hennara.

Fyri eini tíð síðani vóru eini sethús bygd her, og gongst sum ætlað verður kanska arbeiði aftur í bygdini.

Sum skilt, verður arbeitt við at fáa gongd aftur á flakavirkið í Haldórsvík, og verður sæð við spenningi, hvussu hetta fer at útarta seg.

- Eg veit so einki um, hvussu stórt virksemið verður. Men alt er frægari, enn einki arbeiðspláss at hava í bygdini, sigur Elsa Andreasen, bygdaráðslimur.

# Kirkjan fær nýggja altarbók

Á heysti næsta ár er ætlanin at tann nýggja altarbókin kemur út. Hetta er ein hending sum ein ikki upplivir á hvørjum degi.

Bókin ber hetta heitið, tí hon liggur á altarinum í kirkjuni. Hon er grundarlagið undir læru og málburði fólkakirkjunnar.

Í Altarbókini eru bønir til sunnu- og halgidagarnar í kirkjuárinum. Eisini eru bønir til serligar løtur, bæði góðar og tyngri løtur á lívsleiðini.

- Tann bíbilski teksturin er tikin úr bíbliutýðingini, ið Jákup Dahl, próstur, og Kristian Osvald Viderø løgdu úr hondum. Málið er mergjað og gott og ber ein tignarligan dám, ið hóskar væl til sálmarnar og gudstænastuna sum heild. Ikki minst til ævihátíðir manna, klæðir ta løtuna at málið situr væl, sigur bispur, Jógvan Fríðriksson.

Uppskotið til nýggja Altarbók varð handað biskupi um ársskiftið, og nú fer ein serlig nevnd at lesa, rættlesa og meta um úrslitið.

Í fólkakirkjuni eru viðurskiftini rundan um hámessuna skipað við lóg. Løgmaður løggildar ritual, altarbók og sálmabók eftir tilmæli frá biskupi um landsstýrismannin.

*snorri@sosialurin.fo*



25 ÁR

*Sunda Byrsufelag hevur í ár verið til í fjórðings øld*

# Skotini gella við sama lag

**Sundalagið:** Í ár eru liðin 25 ár síðani Sunda Byrsufelag sá dagsins ljós.

Hetta ætla tey í felagnum ikki at lata fara aftur við borðinum uttan markering.

Í hesum sambandi verður skjótibreytin hjá felagnum opin fyri almenninginum leygardagin 16. apríl, tá øll eru vælkomin at royna seg við nøkrum skotum. Til ber at lána byrsu og patrónir. Felagið bjóðar ein drekkamunn og annað gott, so tað skuldi ligið væl fyri at lært ítróttina at kenna henda dagin.

Sunda Byrsufelag hevur í roynd og veru longu fingið eina føðingardagsgávu, um ein kann siga tað so.

Á býráðsfundi í Sunda kommunu mánakvøldið varð samtykt, at lata felagnum 6.000 krónum í stuðli til tiltøk í sambandi við 25 ára degnum.

*snorri@sosialurin.fo*